MARKAMÓTSNEVNDIN

Almanna- og mentamálaráðið

Dagfesting 19. desember 2022

Mál viðvíkjandi borgara undir 67 ár – umlætting og búpláss

Málslýsing
Almannaverkið heitti við skrivi, dagfest 16. februar 2022 á Markamótsnevndina, um at taka støðu til markamót 3 í markamótsskjalinum viðv. § 14, stk. 2 í løgtingslóg um heimatænastu, eldrarøkt v.m. og § 46 í lógini um almannatrygd og tænastur (fyrrverandi § 32 í forsorgarlógini).

Ítøkiliga málið er um ein borgara undir 67 ár, sum var sjúkur og hevði tørv á umlætting, tí makin hjá borgaranum eisini gjørdist sjúkur og ikki megnaði at taka sær av borgaranum.
Borgarin lá á sjúkrahúsi, sum vendi sær til Almannaverkið, fyri at fáa umlætting til borgaran meðan makin kom á sjúkrahús. Almannaverkið vendi sær til heimstaðarkommununa, tí Almannaverkið ikki hevur umlætting til henda málbólkin. Kommunala samstarvið vísir á, at tey játtaðu at veita umlætting, tí Almannaverkið ikki hevði nøktandi tilboð í nærumhvørvinum til eina familju í serliga truplari støðu.

Talan var um eina umbidna tænastu, sum Almannaverkið hevur havt í hyggju at gjalda fyri, og heimstaðarkommunan játtar hetta útfrá hesum fyrisetningi.

Tann 17. november 2021, verður ein serlæknaváttan skrivað og tá er greitt, at talan er um ein doyggjandi persón. Tá er øllum pørtum kunnugt, at tørvur er á einum búplássi og ikki umlætting eisini, tí at borgarin er illa sjúkur, og ikki verður mettur førur fyri aftur at kunna taka sær av makanum.

Viðgerð av málinum
Sambært § 14, stk. 1 í løgtingslóg um heimatænastu, eldrarøkt v.m., hýsa røktarheim og eldrasambýli fólkapensjónistum við ellisbreki ella varandi sjúku. Undantakið er so, at í serligum føri, kann eitt røktarheim ella eldrasambýli, hýsa øðrum røktarkrevjandi persóni enn fólkapensjónistum.
Sambært serligu viðmerkingunum til § 5, stk. 4, kunnu fólk, sum eru doyggjandi, og sum ynskja at fáa eitt pláss á røktarheimi, eisini koma undir undantakið frá meginregluni í § 14, stk. 2.
Atlitið til sjálvsavgerðarrættin hjá borgaranum er eisini týdningarmikið í hesum sambandi. Og tað merkir, *at borgarin í størst møguligan mun eigur at verða hoyrdur, og hava eina ávirkan á, hvat bústaðartilboð verður sett honum í boði.*

Í báðum hoyringarsvarunum frá kommunala samstarvinum, verður víst á, at borgarin ikki sjálvur hevur ynskt at fáa búpláss frá kommunala samstarvinum, men samstundis stendur í hoyringarsvarinum, dagfest 30. mars 2022, at "*umstøðurnar heima broyttust munandi, og ikki var møguligt at vera heima longur, varð borgarin innlagdur á sjúkrahús".* Markamótsnevndin metir tí, at tað ikki er grundarlag fyri at siga, at borgarin ikki vil inn á røktarheimið.

Borgarin kom inn á røktarheimið, og býr har stutt, tí borgarin doyði uml. 2 mánaðir seinni. Borgarin fekk hóskandi og viðkomandi røkt, við tað at røktarheimið setti eyka fyriskipanir í verk, og eyka starvsfólk. Tænastan til hendan borgara setti sera stór krøv til starvsfólkahópin við tað, at tað er fakliga krevjandi at taka sær av borgara við ítøkiligu diagnosuni, sum er doyggjandi. Hetta kann tískil metast,

sum ein uppgáva, sum er meira enn, hvat vanliga krevst av einum ellis- og røktarheimi við tað, at talan var um eina "hospice uppgávu". Uppgávan er eisini av slíkum slag, at hon vanliga liggur uttanfyri ta tænastu, sum Almannaverkið skal veita, sambært § 46 í lógini um almannatrygd og tænastur.

Markamótsnevndin ásannar, at í hesum førinum, hevði borgarin verið eitt upplagt evni til eitt hospice. Tað liggur uttanfyri økið hjá Markamótsnevndin, at avgera hvør skal reka hospice uppgávur, og mugu avvarðandi politiskir myndugleikar eggjast at taka støðu til, hvør eigur ábyrgdina av at reka hospice í Føroyum. Í hesum sambandi kann verða víst á Krabbameinsætlanina.
Hetta málið vísir, at samstarv millum geirar kann rigga. Staðfestast kann, at geirarnir finna ein praktiska loysn, fyri at borgarin ikki skal merkja nakað til, at geirarnir eru ósamdir um, hvør eigur uppgávuna, og at uppgávan verður loyst á nøktandi hátt.

Niðurstøða
Markamótsnevndin metir ikki, at hon kann avgera um annar, ella hin parturin, átti at skula lyft hesa uppgávuna við tað, at talan er um eina serliga krevjandi uppgávu, sum liggur uttanfyri virkisøkið hjá bæði eldrarøkt og Almannaverkinum.

Markamótsnevndin avgerð tí, at í hesum ítøkiliga máli, eigur Almannaverkið at rinda kostnaðin fyri tað tænastu tey umbiða frá heimstaðarkommununi, fram til tað gerst greitt, tann 17. november 2021, at talan er um doyggjandi persón, tí tá er greitt, at borgarin kemur ikki heim aftur, og má hava varandi umsorgan, og tískil má heimstaðarkommunan rinda kostnaðin frá 17. november 2021, og fram til borgarin doyr.

Anna Dam, forkvinna

Jan Sjóstein

Katrin Danielsen